Frelsunarherurin:

# Jólagrýta til heimleys og neyðstødd



*Fyrstu ferð Frelsunarherurin í Føroyum royndi tiltakið við jólagrýtu var í 1928 uttan fyri Gamla Apotek á Vaglinum, tá stóð Jana Jacobsen, sum ung genta, grýtuvakt. Hon ansaði eftir grýtuni og pengunum sum komu inn. Myndin er tikin á Ellisheiminum í Havn fyrr í ár, stutt áðrenn hon andaðist yvir 90 ára gomul*

*Mynd: Inger Hansen*




*Njál Djurhuus og Sámal Jákup Joensen frá Frelsunarherinum við Jólagrýtuni, sum kemur at vera í SMS fram til jólaaftan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Eins og í fjør skipar Frelsunarherurin fyri Jólagrýtu í SMS. Jólagrýta er eitt tiltak fyri at savna pening inn til heimleys, gomul, sjúk ,og tey sum eru illa fyri í samfelagnum**

HJÁLPARARBEIÐI
*Magnus Gunnarsson*

Slagorðið hja Frelsunarherinum er "Umsorgan fyri alt menniskja"

Tiltakið við Jólagrýtu er 110 ár gamalt. Tað byrjaði í San Francisco í 1894, tá leiðararnir hjá Frelsunarherinum har, Ruth og Joe McFee, sóu stóru neyðina í býnum, fólk vóru arbeiðsleys, heimleys, svong, einslig og sjúk.

Øll ynsktu sær arbeiði, men einki arbeiði var at fáa. Fólk búu á gøtunum, í køssum og skúrum, og alkohol var einasta troystin í allari neyðini.

Tey skipaðu fyri eini innsavning og settu eina stóra grýtu upp við ferjuterminalin, har nógv fólk ferðaðust til og frá býnum. Tá jólini komu kunda tey borðreiða fyri 1400 fólkum.

Soleiðis byrjaði tiltakið við jólagrýtu, sum hevur breitt seg til størsta partin av heiminum. Í Norra hevur tiltakið verið roynt í meira enn 100 ár.

Í fjør komu 70.000 krónur inn við tiltakinum í SMS. Peningurin fór til Herbergið hjá Frelsunarherinum og til gomul sjúk, og tey sum eru illa fyri í samfelagnum.

Sámal Jákup Joensen og Njál Djurhuus frá Frelsunarherinum, siga, at endamálið við innsavningini er at hjálpa teimum, sum ikki hava tað gott.

Royndir í Noreg vísa, at tey flestu andlátini millum rúsmisnýtarar koma av feil- og undirernering. Tí leggur Herbergið stóran dent á at kunna borðreiða við døgurðum og øðrum góðum mati til tey, sum raðfesta rúsevni fram um mat. Higartil í ár hevur Herbergið borðreitt við 2046 døgurðum til 52 persónar.

Frelsunarherurin takkar øllum sum vilja stuðla innsavningini, og øllum sum koma til Herbergið við mati.

# Guðrun og tey mugu flyta til Århus

**Sangkappingin Stjørna í eitt kvøld skal haldast í Århus, tí nevndin í Danmarks Radio vil hava fleiri sendingar framleiddar úti um landið**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinasta útgávan av sangkappingini Stjørna í eitt kvøld skal sendast beinleiðis úr Århus. Hetta hevur nevndin í Danmarks Radio gjørt greitt.

Orsøkin er, at DR vil hava størri framleiðslu úti um landið, skrivar danska blaðið BT, men nevndin í DR vil ikki váttað, at samanhangur er millum teirra ynskja um størri framleiðslu úti um landið, og at Stjørna í eitt kvøld verður flutt úr høvuðsstaðnum og til Århus.

– Tað hevur leingi verið eitt ynski um at gera onkrar stórar sendingar uttanfyri høvuðsstaðin, og studio í Århus er tað største av sínum slagi, og tí kunnu vit fáa nógvar áskoðarar inn har, sigur Søren Terkelsen, undirhaldsstjóri í DR, við BT.

### Guðrun roynir seg

Seinasta kappingin við Stjørnum í eitt kvøld verður millum luttakarar, sum hava gjørt vart við seg í undanfarnum kappingum.

Ein teirra er Guðrun Sólja Jacobsen, sum vann eina av kappingunum. Hin vinnarin við føroyskum ættarbondum, Gunnar Mikkelsen, verður ikki við í kappingini.

Øll tey átta innleiðandi umførini verða hildin í Århus, og finalan verður eftir øllum at døma hildin onkra aðrastaðni í Jyllandi.

DR vil ikki siga nakað um, hvussu nógv tað kostar at flyta kappingina úr Keypmannahavn og til Århus, men DR váttar, at tað verður nakað dýrari at halda kappingina í Jyllandi.

